Vikuskiftið Sosialurin

Nr. 20 - 29. januar 2010

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at urnan við

**Jógvan av Kák**

fer úr Vesturkirkjuni mánadagin kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Karen, Edward og systkini**

## Føðingar

Mánadagin 11. jan. fingu Marita og Birger Carlsson eina dóttur. Hon vigaði 3870 gr. og var 56 cm long. Tey búgva nú í Odense.

21. januar fingu Josefina og Elfinn Vang, Kalbak, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4350 gr.

22. januar fingu Annika og Niclas Pearce, Tvøroyri, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4350 gr.

22. januar fingu Birgit Gleðisheygg og Jóhan Vilherm Lognberg, Nes, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3250 gr.

23. januar fingu Ingun og Samuel Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4050 gr.

24. januar fingu Eyð Klein Olsen og John Vilhelmsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3750 gr.

25. januar fingu Lena Nybo Hvítklett og Hjalti Hvítklett, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3475 gr.

26. januar fingu Annika Sigmundsdóttir og Jón Falkvard, Sørvágur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3070 gr.

26. januar fingu Hanna H. Joensen og Thordur Andreassen, við Norðskála, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3310 gr.

26. januar fingu Sigrid Súsanna Jacobsen, Klaksvík og Helgi Strøm, Trongisvági, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3500 gr.

26. januar fingu Maria Larsen og Ásmund Zachariasen, Argir, ein son. Hann var 45 cm langur og vigaði 2330 gr.

27. januar fingu Linda Olsen og Jóhann Behrens, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

28. januar fingu Lív og Aron Olsen, Toftir, ein son. hann var 58 cm langur og vigaði 4725 gr.

28. januar fingu Rannvá Sørensen og Gunnar Hentze, Norðragøta, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3740 gr.

28. januar fingu Katrin og Kári Næss, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3550 gr.

## Dagurin

29. januar. Valerius. Var síðst í triðju øld biskupur í Trier í Týsklandi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Jaspur Langgaard maknaðarleiðari á Sosialinum




*Jan Müller, stjóri á Sosialinum ynski Jaspur Langgaard vælkomnum í Miðlahúsið*

*Mynd Jens K. Vang*

Tað verður Jaspur Langgaard, Nes, ið verður nýggjur sølu- og marknaðarleiðari á Sosialinum.

Jaspur hevur lisið datamatikara í Odense og hevur eftir lokna útbúgving arbeitt á Formula.fo, Almannastovuni, Bláa Krossi, Senta og seinastu tíðina hevur hann rikið Hotel Runavík.

Jaspur er ikki kendur við miðlaheimin, men hevur arbeitt nógv innan sølu og marknaðarføring. Hann skal avloysa systrina, Gudny Langgaard, ið fór á starv Vodafone um ársskifti.

Jaspur Langgaard, ið er 39 ára gamal, er giftur við Olivia og eiga tey tveir dreingir. Hann tekur við starvinum 1. feb. 2010.

# Heimsins besti rustverji 70 ár




*Kaj Boetius er framvegis virkin sum rustverji hjá Ivan Bilum við Hoyvíksvegin*

Kaj Boetius, ið starvast sum rustverji hjá Ivan Bilum við Hoyvíksvegin, er júst rundaður tey sjeyti árini. Hann fylti týsdagin 26. januar 2010. Hóast henda lutfalsliga høga aldur, er hann still going strong.

Kaj byrjaði at arbeiða hjá Ivan Bilum í januar 1999 og hevur sostatt arbeitt við Dinitrol í 11 ár. Hetta tíðarskeiðið hevur hann nærum ongan sjúkradag havt. Og hóast hann koyrir millum Klaksvík og Tórshavn, so hevur veðrið ei heldur forða honum í at koma til arbeiðis. Starvsfelagarnir hjá Kaj ynskja honum hjartaliga tillukku við degnum og takka fyri hesi 11 árini.